# ”Tykissamfelag Svínoy”
# Skúlin sum miðdepil – ein lýsing av umstøðum



Jógvan Edmund á Geilini mai 2004

# Innihaldsyvirlit

**Fororð** 4

**Endamálsorðing/avmarking** 5
- Høvusevnið 5

**Háttalag** 5

**Faktaparturin** **6-9**
Viðmerkingar til faktapartin 6

Tykissamfelag Svínoy
- Hugskotið/ endamálið við netinum 6
- Hvussu netið kom í lag 6
- Bygnaður av netinum 7
- Skúlin sum miðdepil 7

Svínoyar skúli
- Útbúnaður 7
- Næmingar 7

Nýtslan av KT
- Brúkið av intranetinum 8
- Brúkið av internetinum 8
- Kjatt 8
- Teldupostur 8
- Netmyndatól 8-9
- Heimasíðugerð 9
- PowerPoint og StoryMaker 9-10
- Onnur forrit 11

**Kanningarparturin** **12-13**
- Viðmerkingar til kanningarpartin 12
- Spurningar til næmingar 12
- Næmingasvarini 13-14
- Viðmerking til spurningarnar 13

**Teoriparturin** **14-19**
- Viðmerkingar til ástøðiliga partin 14
- A – og B hold 14-15
- Stovnurin og heimið 13
- Førleikamenning 15-16

- Dreingja og gentu mentan 17
- Gardners intelligens teori 18
- Kjatt 18
- At læra og at spæla 19

**Viðgerðarparturin** **20-22**
- Viðmerkingar til viðgerðarpartin 20
- Atkomumøguleikin 20
- Forritini 20-21
- Innlæringin 21
- Persónliga menningin 21

**Niðurstøða** 22

**Keldulisti** 23

**Fylgiskjøl** 23-24

## Fororð

Hendan uppgávan er skrivað í sambandi við telduvarðaútbúgvingina. Evnið til uppgávuna “Tykissamfelag Svínoy” er valt, tí hetta var nærliggjandi og viðkomandi, við tað at eg sjálvur havi havt ein aktivan lut í netinum og netumsitingini. Tá ið eg eisini starvist sum lærari, ynskti eg eisini at fáa nakað av ástøðiligum tilfari um evnið, so møguligt er at samanbera undirvísingina, sum næmingarnir fáa í Svínoy við námsfrøðiligar tankar hjá øðrum. Eg kom fram á bókina *Den kreative computer* eftir Sadedin Elmazovski Jepsen og Ulrik Knudsen og havi nýtt hana at citera og referera úr, sum ástøði og til at samanbera við. Bókin er frá august 2003, so eg vil halda, at hon skuldi verið dagførd.

Eg vil takka øllum, sum hava hjálpt til við uppgávuni. Bæði næmingum, vegleiðara og undirsita.

Jógvan Edmund á Geilini

Mai 2004

## Endamálsorðing/avmarking

## Høvuðsevnið

Geva eina lýsing av netinum “Tykissamfelag Svínoy”, - hvussu hesar bøttu umstøður hava ment førleikan hjá skúlanum at nýta KT í frálæruni.

## Herundir.

1. Geva eina lýsing av førleikum, sum næmingar hava fingið hesi árini.

2. Hvønn týdning halda næmingarnir, netið hevur og hevur havt fyri at menna teirra førleika innan KT?

3. Ávirkar netið, ella hevur netið ávirkað teirra gerandisdag?

## Háttalag

Fyri at náa endamálinum, at geva eina lýsing av netinum “Tykissamfelag Svínoy”, havi eg valt, at býta uppgávuna upp í fýra partar.

Tann fyrsta partin, havi eg kallað faktapartin, tí har verður ein lýsing givin av teimum veruligu umstøðunum.

Annar partur, er ein kanningarpartur, hvar næmingar verða spurdir við spurnarbløðum um nakrar umstøður viðvíkjandi netinum og undirvísingini.

Triði parturin er ein ástøðiligur partur, hvar ið eg havi valt ástøðið, um nøkur evni, sum eg meti liggja tætt upp at tí, sum vit hava gjørt í Svínoyar skúla.

Í fjórða partinum, verður so roynt at viðgera upplýsingar úr teimum trimum fyrstu pørtunum, fyri at enda at náa fram til eina niðurstøðu.

# Faktaparturin

### Víðmerkingar til faktapartin

Í hesum partinum er ætlanin at geva eina lýsing av hugskotinum “Tykissamfelag Svínoy”, hvussu hetta kom í lag, og hvussu vit í Svínoyar skúla eftirfylgjandi hava nýtt kt í frálæruni.

## Tykissamfelag Svínoy

### Hugskotið

Eftir at hava frætt um, at Vinnumalaráðið sóknaðist eftir hugskotum, sum kundu menna Føroyar sum tykissamfelag, og vit í Svínoyar skúla høvdu ynski um eitt betur internetsamband, var hugskotið har, hetta at knýta alla bygdina saman í eitt net og verða felags um internetsambandið. Hví skuldi skúlin ikki ganga undan og geva øllum møguleika at nýta hansara net. Kom hetta ílag, vildi tað eisini geva næmingunum ein serligan møguleika at nýta intra- og internet dagliga.

### Hvussu netið kom í lag

Í mars 1999 var so umsókn ið lýsti ætlanina send Vinnumálaráðnum. Okkara ætlan skuldi kappast við uml.10 aðrar verkætlanir.  Á heysti sama ár kom játtandi svar, um at Vinnumálaráðnum (VMR) vildi seta ætlanina í verk, sum eina serstaka royndarverkætlan ella kt-pilotverkætlan.

M. a. verður sagt soleiðis.

*Ein kt-pilotverkætlan merkir, at ein roynir nakað í verki, sum ikki er roynt áður. Málið er, at aðrar bygdir ella grannaløg nýta skipanina sum grundarlag og geva íblástur til líknandi framtøk aðrastaðni. Langtíðarmálið er at menna Føroyar sum kt-samfelag.*

*Tann besta langtíðaravleiðingin vildi verið, at Svínoy gjørdist eitt veruligt tykissamfelag og partur av alheims tykissamfelagnum, har vinna og fólk nýta endaleysu møguleikarnar til at menna vinnu, mentan, útbúgving og harvið trivnaðin.*

Í juni ár 2000 var so skipanin alment tikin í nýtslu. Á heysti 2001 var Fugloyggin eisini knýtt í netið.

### Bygnaðurin av netinum

Skúlin og húsini í bygdini eru knýtt saman við tráðleysum sambandi 11mb/s. Tá umstøðurnar eru soleiðis, at tað sást nærum til øll húsini frá skúlanum er bert neyðugt við einum knútapunkti afturat tí, sum er í skúlanum. Sambandið til Fugloyar er eisini tráðleyst. Sambandið við internetið er ein 2 mb/s linja frá Føroya Tele, sum tær íbundnu teldurnar býta sínamillum.

### Skúlin sum miðdepil

Í Svínoyar skúla stendur ein ambætari. Hesin er eisini ein heimasíðuambætari og ein postambætari.
Ambætarin tekur sær av vanligum tænastum sum logon skript, brúkarum og loyniorðum. Men eisini heldur hann skil, á hvussu nógv hvør brúkari og hvør telda tekur niður av internetinum.

## Svínoyar Skúli

### Útbúnaður

Svínoyar skúli hevur 7 teldur, tríggjar sum koyra xp, harav tann eina er ein fartelda. Hinar eru av eldri dato og hava windows 98. Ein góður skannari og eitt digitalt myndatól er eisini. Av ritbúnaði kann verða nevnt, at skúlin hevur offispakkan frá microsoft. Eitt program til heimasíður, sum kallast SiteSentral sum er sera brúkaravinarligt. Eitt programm, sum hevur verið nógv brúkt, er StoryMaker ella FortællNu, sum tað eisini kallast. Eisini hevur skúlin myndaviðgerðarforrit umframt fleiri onnur undirvísingarforrit.

### Næmingar

Hesi seinastu árini hava tað verið 5 til 7 næmingar í Svínoyar skúla. Næmingarnir hava verið í ymiskum árgangum – heilt upp í 9. árgang. Sjálvur havi eg undirvíst í øllum lærugreinumum, og vil eg siga, at teldan hevur verið ein partur av gerandisdegnum.

## Nýtslan av KT

### Brúkið av intranetinum

Næmingarnir hava fingið førleika í at gera mappur, býta tær, seta loyniorð á, broyta loyniorð og sletta loyniorð. Hetta hevur verið sera hent, m.a. kundu næmingarnir heinta tilfar, sum lá heima við hús gjøgnum netið,ella hinvegin, heinta tilfar, sum lá í skúlanum, heimanifrá. Eisini kundu teir heinta tilfar, tá teir vitjaðu hvønn annan. Tilfar liggur eisini alment á intranetinum, sum øll í bygdini hava atgongd til, eitt nú kann verða nevnt myndatilfarð og tónleikur. Vanligt er eisini, at intranetið verður nýtt til at spæla ígjøgnum, at spæla "multi", sum tey siga.

### Brúkið av internetinum

Internetið hevur verið brúkt dagliga, hevur verið ein vanligur og náttúrligur partur av gerandisdegnum á skúlanum. Næmingarnir hava havt atgongd til internetið í viðkomandi tímum, flestu fríløtunum á skúlanum og eisini eitt sindur eftir skúlatið. Harumframt hava teir havt atgongd til internetið heimanífrá.

Hetta hevur ført við sær, at næmingarnir hava fingið góðar førleikar í at leita á internetinum. Bæði við at leita við sokallaðum leitimaskinum og á annan hátt.

Námsfrøðiliga hava vit nýtt internetið til at finna tilfar, sum á ein hvønn hátt hevur havt samband við onkran ávísan spurning í undirvísingini. Nevnt kann m.a verða, at tá undirvíst verður um rúmdina eru heimasíður sum tygobra og nasa náttúrligar. Internetið er eisini hent til at finna tilfar til ávísar uppgávur í samband við undirvísingina, t.d. stílskriving. Eisini kann verða nevnt at vanligt er at at vitja heimasíðurnar hjá teimum stóru tíðindastovunum, tá í undirvísingarvinarlig tíðindi eru í ùt og sjónvarpi. Eitt nú tá ið nátturuvanlukkur eru.

Persónliga nýta næmingarnir internetið til at finna tilfar, sum hevur egnan áhuga. Tað veri seg upplysingar um ein tónleikara, eina knallert, eitt telduspæl ella hvat tað nú er, sum hevur áhuga.

Spæl er vanligt á internetinum, fyri tað mesta einmansspøl. Ikki hevur so nógv verið spælt í móti øðrum úti í verðini tí tá er aloftast neyðugt at opna fleiri portur á servaranum. Tað hava vit valt ikki at gera orsakað av tryggleikanum. Men eg haldi, at børnini hava sakna hendan spælmøguleikan.

**Kjatt**

Eitt sindur hevur verið kjattað í skúlanum, mest ígjøgnum forritið “first class” men eisini eitt sindur gjøgnum forritið“MiRC”. Munurin millum “first class” og “MiRC” er, at tá tú kjattar á “first class” er tú kendur, men tá kjattað verður á “MiRC” er tú ókendur, - t.v.s. at tá nýtir tú loyninavn.

Tað kann vera nevnt at eitt skiftið høvdu vit samskifti við ein skúla í Suðurjútlandi. Við tann skúlan samskiftu vit ígjøgnum kjatt á “first class”.

Í bygdini hevur onkur kjattað sera nógv, ja so nógv og gott, at makin er funnin á hendan hátt.

**Teldupostur**

Eitt sera hent amboð er teldupostur.Hetta at kunna samskifta við øll allastaðni bara tey hava atgongd til internetið og eina teldupostadressu, - bæði kenningin uttanlands og tín síðumann.

Næmingarnir hava sent teldubrøv til kenningar bæði innan- og uttanlands, hvønn annan og onnur við.

Svínoyar skúli hevur samskifti við ein lítlan skúla á Sottunga á Álandi, sum er líkur Svínoyar skúla á tann hátt, at hesin skúlin eisini liggur á einari útoyggj, hvar fá fólk búgva. Sottunga skúli kann eisini hava næmingar frá fyrsta flokki upp í níggjunda flokk, eins og Svínoyar skúli havur havt.

Hetta samskiftið kom í lag við, at Svínoyar Skúli var við í eini norðurlenskari verkætlan, har skúlar frá Íslandi ,Føroyum,Svøríki og Álandi vóru við. Skúlarnir vóru felags um verkætlanina, men vit í Svínoy høvdu serliga samskifti við skúlan á Sottunga. Endamálið við verkætlanini var at læra um viðurskiftini hvør hjá ørðum við at nýta kt sum samskiftishátt, og soleiðis samstundis læra at nýta kt.

Næmingarnir lærdu at taka myndir við digitalum myndatóli, leggja hesar inn á teldu og síðani at senda hesar sum teldupost.

**Netmyndatól**

Vit í Svínoyar skúla settu upp eitt netmyndatól. Hetta netmyndatólið settu vit til at taka eina mynd hvørji 30 sek. Hendan myndin bleiv síðani so hvørt løgd upp á heimasíðuservaran soleiðis at øll sum høvdu atgongd til internetið sóðu hana. Hetta

var sera áhugavert, kanska serliga í samband við fyrr nevndu norðurlendsku verkætlan. Netmyndatólið gav teimum møguleika at fylgja við, hvussu veðrið var í Svínoy. Serliga bitu tey merki í, hvussu skiftandi veðrið var. – Tátt tann eina dagin og kavi tann næsta o.s.v.

Nevnt kann vera, at ein 3.flokkur á Stokseyri í Íslandi hvønn morgun kl 10 í longri tíð hugdi eftir “kindunum” sum komu at eta.  Vit høvdu ikki givið okkum fær um at netmyndatólið peikaði beint á eina moys hvar seyður fekk at eta. Tá vit so tann eina dagin fingu ein fyrispurning um, hví “kindurnar” ikki vóru har tann eina morgunin kundu næmingarnir læra at “kindur” eru ær á Íslenskum.

## Heimasíðugerð

Til gerð av heimasíðum hava vit fyri tað mesta nýtt eitt forrit kallað “SiteSentral”. Hetta er eitt sera brúkaravinarligt forrit eftir mínum tykki. Næmingarnir koma sera skjótt eftir at brúka forritið, - eisini teir yngstu næmingarnir. Kortini kann tað vera, at teir bestu næmingarnir ikki halda seg fáa loyst nakrar uppgávur á nøktandi hátt.

Allir næmingarnir hava roynt at gera persónligar heimasíður. Vit hava eisini arbeitt við at gera eina felags heimasíðu hjá bygdini, harafturat eru heimasíður eisini gjørdar í sambandi við samstarv okkara við onnur.

Tað digitala myndatólið hevur verið nógv nýtt í sambandi við heimasíðugerð. Hetta hevur gjørt, at næmingar blivu dugnaligir í at leggja myndirnar inn á telduna og goyma tær forsvarliga, - Eisini at brenna tær á fløgu.

Við tað at fleiri næmingar eisini ynsktu at nýta pappírsmyndir, sum teir høvdu heimanífrá, bleiv skannarin tikin í nýtslu, og lærdu teir soleiðis at nýta hann samstundis, sum teir fingu myndirar teldutøkar.

Krøvini til ta lidnu heimasíðuna eru ikki tey heilt stóru, heldur verður roynt at fáa næmingarnar til at vera sjálvkrittiskir, soleiðis at teir fáa hug til at betra seg sjálvar allatíðina við at gera heimasíðuna betur. Teir sleppa at leggja heimasíðuna upp á heimasíðuambætaran, tá ið teir sjálvir ynskja tað. Hetta hevur við sær at onkur heimasíða við minni dygd verður løgd út á internetið, men eisini at góðar heimasíður ongantíð verða lagdar út.

## PowerPoint og StoryMaker

PowerPoint hevur ikki verið so øgiliga nógv nýtt. Vit góvu eitt skúlablað út “Másin”. Til hetta blaðið nýttu vit  PowerPoint og fingu næmingarnir tað heilt snøgt. Eisini er onkur søga ella framløga um onkran túr gjørd við PowerPoint.  Eftir mínum tykki er

PowerPoint vælegnað til at gera multimedia uppgávur við. Hetta at kunna seta saman myndir, tekst og ljóð er nakað sum næmingunum dáma, eisini teimum yngru.

Eitt forrit kallað StoryMaker elle FortællNu, hava vit nýtt sera nógv. Hetta forritið kann seta saman myndir, ljóð og tekst og kann eisini lesa tekst upp. Eisini kann forritið fáa myndir av eitt nú djórum og fólkum at flyta seg ella at hvørva heilt. Søgan, sum næmingurin fortelur, verður bygd upp sum ein bók, hvar síður kunnu leggjast afturat allatíðina. Møguligt er eisini fyri ein part at nýta egnar myndir, men fyri tað mesta eru tað myndirnar og figurarnir, sum fylgja við, sum nýtt verða. Hetta forritið, haldi eg, eggjar næmingunum til at seta tekst til myndirnar, soleiðis at teir læra at stavseta samstundis sum teir spæla. – Eisini arbeiða teir fegnir víðari við søgunum eftir skúlatíð.

## Onnur forrit

Skriviprogrammið “Microsoft Word” verður vanliga nýtt sum skriviprogramm.

Á skúlanum hava vit eisini nøkur onnur forrit, sum meira eru gjørd til eina ávísa lærugrein, - eitt nú “Lythør” og “Cellekampen”

Tað tykist sum, at tey forrit, sum geva næmingunum bestar møguleikar at skapa nakað sjálvir, ella eru meira spælkend, eru tey, sum hava mestan áhuga.

# Kanningarparturin

### Viðmerkingar til kanningarpartin

Eg setti mær fyri at gera eina roynd at finna útav, hvussu tann lætta atgongdin til teldunetið og tann undirvísing, ið næmingarnir høvdu fingið, hevði ávirkað teirra gerandisdag og førleika innan kt.

Hetta verður gjørt út frá egnum royndum og upplysingum frá næmingum.

Í hesum sambandi fingu nakrir næmingar spurnarbløð, sum eg so fekk aftur frá teimum. Spurnarblaðið sæst her niðanfyri.

### Spurningar til næmingar:

Hevur tann lætta atgongdin til teldunetið í Svínoy ment tín førleika ella evni til at nýta kt?

Kanst tú í dag siga, at tú hevur ein betri førleika innan kt, enn tú annars vildi havt, tí tú hevur nýtt teldunetið?

Kasnst tú greiða eitt sindur frá hesum?

Heldur tú í dag, at tað er lættari hjá tær at seta teg við eina teldu, tí tú nýtti teldu so nógv í Svínoy?

Hvønn týdning heldur tú tað hevur havt, at teldustovan var mestsum ein partur av skúlastovuni?

Hevur tað havt nakran týdning, at internetsambandið er gott og skjótt?

Heldur tú, at tað hevur havt týdning at tú slapp dagliga til teldurnar?

Brúkti tú teldunetið heima?
Um nei hví ikki?

Hevur tú lært við at royna teg fram ? (spæla spøl íroknað)

Hevur tú lært av øðrum næmingum?

Hevur tú lært av yngri næmingum?

Hevur tú lært av eldri næmingum?

Hevur tú lært av læraranum?

Hevur tú uppfatað læraran sum ein, í skuldi læra teg nakað ella ein, sum hjálpti tykkum, tá ið tit stóðu føst?

Hevði tað týdning, at tú ikki nýttist at hugsa um prísin á internetinum?

Broyttist hetta, tá prísur bleiv settur á?

**Næmingasvarini**

Við tað at næmingasvarini eru so fá í tali eiga tey at vera tikin við einum ávísum fyrivarni, men eg haldi tó sjálvur, at tey geva eina góða ábending.

Tað hevur verið týðandi, at teir komu dagliga til teldurnar, og at teir harvið hava nýtt netið hvønn dag. Teir hava eisini nýtt teldu heima. – At teldurnar vóru sum ein partur av skúlastovuni, hevði tann týdning at tær vóru enn lættari at koma til og tí meira nýttar.

Viðvíkjandi innlæringini siga teir, at  teir hava lært bæði av yngri og eldri næmingum. T.v.s. at aldurin hevur einki at siga. Tað, sum hevur nakað at siga, er, um teir kunnu fáa ta hjálp teir hava brúk fyri.

Teir hava eisini lært við at royna seg fram og av læraranum.

Lærarin hevur verið uppfataður sum ein, í hjálpti til og vegleiddi, tá ið á stóð.

Netið hevur ávirkað og ávirkar teirra gerandisdag soleiðis, at tey í dag kunnu siga, at tey eru munandi beturur til kt, enn tey annars høvdu verið. Tey siga seg eisini vera berur til kt enn tey, sum ikki hava havt sama møguleika sum tey.

Prísurin hevði ta ávirkan, at tá hann bleiv ásettur, bleiv ov dýrt at taka niður av netinum, t.d. musikk og spøl.

**Viðmerking til spurningarnar**

Eg valdi ikki at seta ov nógvar spurningar, tí eg vildi ikki troytta næmingarnar. Hvat ið eg skuldi spyrja um, var kanska ikki nóg greitt. Eitt, sum eg nú haldi kundi verið áhugavert at spurt um, er m.a. hvat teir halda er best við intranetinum, hvørjar kt uppgávur teimum dámdi best og hvørji forrit teimum dámdi best ar arbeiða við. Eg havi fingið at vita frá onkrum næmingi, at hann helt, at spurningarnir vóru í so líkir.

Samanumtikið haldi eg, at bara væl er komið burtur úr spurningunum kortini.

# Teoriparturin

## Viðmerkingar til ástøðiliga partin

Eg havi valt at referera og sitera nøkur brot úr bókini "Den kreative komputer", sum eg meti geva eina nøktandi lýsing av evnum, sum liggja upp at teimum, sum eg ynski at lýsa.

Ætlanin hjá mær við hesum brotum, er at geva lesaranum eina fatan av, hvussu "Den kreative computer" heldur, at teldan eigur at vera nýtt, og eisini fyri at hava nakað at samanbera við.

Ynskir ein fleiri upplýsingar kann ein lesa alla bókina. (Sí keldulista)

## Brot úr "Den kreative computer":

### A - og B – hold

Víst verður til eina rapport, "Inforapporten", sum hevði til uppgávu at geva eina lýsing av komandi "Tykissamfelag" (Informationssamfund), fyri at finna fram til hvar neyðugt er við serligum tiltøkum, soleiðis at A og B hold ikki uppstanda. Tey, sum makta kt og tey, sum ikki gera tað.

Nevnt verður eisini eitt nýtt "fátækrahugtak" : At tey fátæku eru tey sum ikki hava atgongd til kt, og tey ríku tey, sum hava hana.

Fyri at sleppa undan at vit fáa A og B hold er neyðugt, at øll fáa atgongd til kt. Tí hava skúlarnir ein so týðandi leiklut, - heima hava ikki øll atgongd til kt.

Hendan sokallaða "inforapporten" leggur dent á, at skúlarnir brúka tey forrit, sum eru tøk - eisini útlendsk. Men teir ( ridhøvundarnir) sláa fast, at tað enn ikki er eitt nóg stórt útboð av egnaðum forritum. Eisini halda teir, at skúlin eigur at ganga aðrar leiðir.

*"Vi mener imidlertid, at det ikke er den vej, skolen skal gå. Det skal ikke være færdiglavede programmer, der skal præge indlæringsstrategierne for eleverne. Det er ikke optimalt, at skolen er med til at bidrage til elevernes brugermentalitet. Børnene bør i stedet være skabende. Hertil kræves der ikke et stort udbud af programmer. I vores brugermanual har vi eksempelvis taget udgangspunkt i nogle få programmer, som kan danne ramme for elevernes egne produktioner. Indlærning skal ske ved eksperimentering, egne undersøgelser, egen research og ikke mindst en legende tilgang. Eleverne får en meget højere indlæring, når de arbejder ud fra egne præmisser, og bliver mere motiverede, når de selv sætter eget præg på*

*programmerne. Som et biprodukt i forhold til færdige progammer, får børnene her en selvtillid, kritisk sans, og samtidig oparbejder de via den uformelle læring kompetencer, som senere eksempelvis ved skolestart kan resultere i hurtigere udvikling af bl.a. læsefærdigheder. Vi vil dog her understrege, at vores fokus ikke alene er den øgede uformelle lærings kompetencetilegnelse, men derimod at disse processer for børnene er en leg." (s.13)*

Rapportin leggur eisini upp til, at børn krittiskt skulu kunna sortera í tí yvirflóð av informatiónum, sum tey vera dýkt undir við. Tað er tí neyðugt, at børn upparbeiða ein krittiskan sans yvir fyri miðlum, um tey seinni skulu kunna sortera informatiónir. Tí halda teir, at tað er sera neyðugt, at børn brúka skapandi forrit.

*"Den kritiske sans udvikler de i forbindelse med eget skabende arbejde" (s.14)*

Sum pedagogar arbeiða vit út frá tí teori, at barnið er eitt kompetent individ. Tað merkir, at vit mugu taka tað, sum barnið sigur og tess slóðir, í álvara. Sum støðan er í dag vísir barnið áhuga fyri telduni. Tað má vera okkara uppgáva sum pedagogar at eggja barninum, har sum tað hevur áhugan. Tað er byrjunarstøðið fyri nógvum pedagogiskum arbeiði at kunna samansjóða spælið og hugin, sum fylgir við, til eina positiva menning hjá barninum. Fyri at henda positiva menningin kann henda má barnið merkja ein veruligan áhuga frá pedagoginum. Tað kann bara henda við at pedagogurin viðurkennur hvussu týdningarmikil teldan er fyri børnini. Harvið verður pedagogurin noyddur til at laga ta pedagogisku mentanina til tíðina. Tess fyrr tess betur, tað er nógv, sum vit skulu taka innaftur.

Kanning vísir, at tað eru kvinnurnar, sum serliga eru afturúrsigldar innan kt. Men kanningin vísir eisini, at kvinnurnar eru hugaðar at nema sær kt kunnleika, tá ið hesin kann setast í samband við teirra børn. Um hesar kvinnur eru av tí áskoðan, at teirra børn hava brúk fyri, at tær hjálpa teimum við kt t.d. í sambandi við skúlan, motiverast tær enn meira at fáa sær vitan um tøknina.

Tað er breið semja um, at internetið hevur ein týðandi lut í samfelagnum í dag. Tað er týðandi, at fólk kunnu fáa breiðband heima fyri ein fastan prís. Tað merkir, at serliga kvinnurnar kunnu fáa eitt meira avslappa forhold til internetið uttan at hugsa um prís.

## Stovnurin og heimið

GIDEON Zlotnik, fyrrverandi yvirlækni á barnasykiatrisku deild í Glostrup, heldur, at tað er sera neyðugt, at tað eru frítíðarstovnarnir og skúlarnir, sum hava teldurnar. Hann heldur, at teldan í heiminum er ein eyka dadda, sum er við til at passivisera børnini. Gideon Zlotnik hevur gjøgnum 22 ár ikki bara arbeitt við børnunum, men eisini við familjunum. Hansara royndir siga, at foreldrini hava stór og eintýdd krøv til, hvussu børnini skulu brúka telduna, eisini hvat tey skulu fáa burtur úr brúkinum. Børnini blíva av foreldrunum sett í ein samanhang, har strongd og manglandi sjálvsvirðing kann verða úrslitið.

Gideon Zlotnik heldur, at tað er umráðandi, at børn ikki brúka telduna til harðskapsspøl, uttan at vaksin eru hjá, tá tað her er vandi fyri at fáa likamligar og sálarligar skaðar. Zlotnik er tó samdur í, at spøl eru generelt ein sera góður sosialisatiónmiðil. Hansara mark gongur eisini við tey harðskapsspøl, sum teir nevna í *Den kreative computer*. Bestu nyttuna av telduni heldur hann vit fáa, við at nýta hana pedagogiskt, við hjálp av kreativum skapandi forritum.

Sum pedagogar skulu vit bjóða okkum fram sum aktivt luttakandi vaksin. Vit skulu ikki síggja telduna sum eina sovipútu, men sum eitt kreativt og skapandi multispæliamboð.

Vit skulu hava í huga, at tað kann vera minni gott at bróta barnið av mitt í spælinum, kanningini ella arbeiðinum. Tað kann avmarka barnið í at koma fram til eitt nøktandi úrslit. Til dømis er tað tað lidna, og fyri barni nøktandi úrslitið, sum økir um sjálvsálitið. Má barnið avbróta síni kreativiu kynstur mitt í øllum, kann sjálvsálitið vikna og barnið stressast.

## Førleikamenning

Tá tosað verður um menning av persónligum evnum og socialum førleikum hjá smáum børnum, eru fleiri pedagogar bangnir fyri, at teldan tekur tíðina frá børnunum, so tey ikki socialisera og menna seg.

Fyrst og fremst er teldan á stovnunum eitt socialt virksemi. Børn isolera seg ikki, men í staðin taka nýggir felagskapir seg upp tvørs av aldri. Teldan samlar børnini, og ein sannroynd er, at tey hjálpast at við at kanna, og at tey virða hugskotini hvørt hjá øðrum. Ein heilt serligur felagskapur mennir seg framman fyri telduna, hvar snúningsdepilin er bergtøkan av tí, sum kann vísast við miðlinum, og granskanin av forritum og knøttum.

Tað merkir, at eitt fimm ára gamalt barn, sum hevur kt kunnleika og hegni við sær, eitt nú heimanífrá, kann gerast ógvuliga avhildið og eftirspurt av teimum størru

børnunum. Tey vilja hava part í hesari vitan fyri sjálvi at kunnna koma víðari t.d. við einum spæli. Tað gevur status í barnaflokkinum at kunna meistra telduna, aldurin er undirorðnaður. Á handa hátt hava vit verið vitni til, at virðing og vinarløg spretta.

*"Forskningen på Danmarks Pædagogiske Universitet i den digitale børnekultur har vist, at børn udvikler selvværd, samarbejdsevne, tænkeevne og ansvarlighed foran computeren (Holm-Sørensen, 1999)." (s.31)*

Tað áhugaverda í hesum sambandi er, at tað ofta eru hesir førleikar, sum ofta vera nevndir í virkisætlanum, og sum ein ynskir at menna hjá børnum.

- Tá granskingin peikar á, at sjálvsvirðingin mennist, er tað samstundis, sum kunnleikin víðkast frammanfyri maskinuna
- Tá samarbeiðsevnini styrkjast, er tað, tí teldan í stóran mun leggur upp til samarbeiði. Børnini í dag eru meira trygg við teamsamstarv enn teirra foreldur.
- Viðvíkjandi við tí at menna hugsunarevnini er talan bæði um tann logiska og tann strategiska hugsunarháttin. Herundir eisini evnini til sjálvstøðugt at fáa sær yvirlit, og til at greina, tilrættisleggja og taka støðu.
- Ábyrdarkenslan verður ment við at seta mál og náa tey. Tað er m.a, tá tey einsamøll ella saman við øðrum arbeiða við at vinna á avbjóðingum, loysa trupuleikar ella skapa einstakar framløgur við telduni.

**Dreingja og gentu mentan**

Tað vísir seg, at kvinnurnar ikki eru so nógv við á kt økinum. Men sambært fyrrverandi yvirlækna og barnasykiatara Gideon Zlotnik hava gentur nógvar fyritreytir fyri at vera betur til telduna enn dreingir. Her verður serliga hugsað um tær betri fingraførleikarnar hjá gentunum, sum gera, at tær betur kunnu raka knapparnar enn dreingirnir og teirra málsligu evni, sum gera at tær skjótari kunnu fanga bókstavir og lesa tey orð, sum koma á skermin.

Dreingirnir harafturímóti hava ein avgerandi fyrimun í mun til genturnar, tá teirra 3D-rúmfatan og 3D-hugsunarevni eru betri. Tí hava teir ikki á sama hátt fyri neyðini at gera yvirlitsætlan, áðrenn teir fara í gongd við uppgávuna. Eisini leggja teir einki í, um tað larmar, meðan genturnar vilja hava tað meira friðarligt.

## Gardners Intelligensteori

Amerikanski granskarin Howard Gardner arbeiðir út frá ástøðinum um, at menniskja hevur fleiri intelligensar. Hann skilgreinar intelligens sum: Evnini til at loysa trupulleikar, ella at síggja vegin til, hvussu eitt mál verður nátt.

*"Howard Gardner mener, at skolen bør tilrettelægge undervisningen på en sådan måde, at den både henvender sig til de elever, der bedst lærer ved hjælp af mesterlære-prinsippet (traditionel læring), men også henvender sig til dem, der bedst lærer  via at eksperimentere sig frem til læringen, som tilfældet er i daginstitutionerne.*

*Ved den traditionelle indlæringsmåde er det læreren, der hovedsaglig har hovedrollen ved at være den formidlende part. Ved den eksperiterende indlæringsmåde er det læreren der skal opsætte rammerne, og eleverne, der skal eksperimentere sig frem til læringen. Læreren får her en konsulent/supervisor rolle." (s 35)*

## Kjatt

Kjattð er eitt sera vælegnað stað hjá børnum. Tey eru sera upptikin av at royna ymsar leiklutir. Reint fysiologiskt byrja børnini at kunna hugsa meira abstrakt. Tað er týðandi fyri barnið, at tað kann royna seg í ymsum leiklutum, soleiðis at tað fær eina fatan av sær sjálvum í mun til samfelagið og umhvørvið.

Kjattið er eitt upplagt stað hjá børnum og ungum at royna seg í ymsum leiklutum. Tað vil allarhelst fáa eina positiva samleikamenning. Kjattið er eitt stað, hvar børnini kunnu royna seg í teirra fantasispølum. Tað er gjøgnum spælið, at menningin slær seg leysan bæði fyri barnagarðsbarnið, eins og fyri tann unga.

Børnini fáa eisini gjøgnum kjattið venjing í at stava og í at skriva. Tað er ikki líkamikið, hvussu stavað verður, og hvussu skjótt tað verður skrivað. – Als ikki um barnið sigur seg vera ein annan, enn tað er.

Fyrimunirnir við at brúka kjattrúm eru sjálvsagdir. Vit kunnu hugsa okkum, at vit nýta kjattrúm í fremmandamáli. Børnini fáa eina veruliga føling av at fremmandamálið er nakað, sum kann brúkast uttan fyri skúlan. Samrtundis sum tey økja um orðavalið, verður teirra skriftmál styrkt.

## At læra og at spæla

*"Med udbredelsen og integrationen af de digitale medier, har medieforskerne på Danmarks Pædagogiske Universitet opdaget en ny børnekultur. Den nyopdagede børnekultur ændrer – ifølge forskerne – den tradionelle prioritering af leg-og læringsbegreberne, således at det er legen, som er målet og læringen midlet. Dette er selvfølgelg set ud fra et børneperspektiv."*

Hjá børnunum hevur málið altíð verið spælið. At læra hevur verið neyðugt fyri at náa málinum. Tí hevur barnið havt ein høgan motivatiónsfaktor, sum hevur gjørt, at tær uppgávur, sum máttu loysast fyri at koma víðari við spælinum, vóru loystar.

Teldan leggur upp til, at barnið ger royndir við teimum mongu møguleikunum, sum eru í forritunum. Fyri barni, verður hendan granskan uppfatað sum eitt spæl. Tað er ikki tann stóri munurin, um tað er eitt spæl, eitt stýriforrit ella tekstviðgerð.

Forritini geva ofta fleiri møguleikar at velja í millum fyri at náa sama máli. Hetta er við til at geva barninum eina fatan av, at fleiri møguleikar kunnu geva sama úrslit, - eisini í øðrum viðurskiftum. Á hendan hátt verða skaptar kreativar loysnir, sum kunnu skifta hvørja ferð. Kreativa støðutakanin ger barnið sjálvstøðugt, samstundis sum evnini til team samstarv verða styrkt.

Teldan er ein nattúrligur partur av gerandisdegnum hjá børnunum. Í spælinum rundan um telduna oysa øll børn av teirra vitan. Tey hjálpa hvørjum øðrum og eru við til at læra hvønn annan. Teldan og telduspølini skapa sambond tvørs av aldri, kyni og etniskum uppruna. Tað er tann felags áhugin og spælið, sum eru tey grundleggjandi tingini fyri børnini.

*"Vi har løsningen på de skjulte ressourcer hos børn. Det er legen, der er målet, og læringen der er midlet. De folkeskoler, der allerede har prøvet at integrere IT i undervisningen, har erfaret, at eleverne ikke vil gå til pause, de bliver tilbage og arbejder videre."*

*Med computeren møder barnet et sted, hvor der er trygt. Mange af børnene var bedre end mig ved brugen af computer. De møder ikke en mystisk voksen, der ved en masse, men en voksen der stråler af denne barneglæde. Der reagerer på samme måde som børn, når vi spiller.*

*G. Zlotnik, 2001*

# Viðgerðarparturin

### Viðmerkingar til viðgerðarpartin

Í hesum partinum er ætlanin at royna at samansjóða royndirnar sum eg havi (faktaparturin), við upplýsingarnar, sum eg havið fingið frá næmingunum (kanningarparturin) og upplýsingar úr lesnaði (teoripartinum), fyri at koma framm til eina niðurstøðu, sum kann geva eitt stutt og nøktandi svar upp á spurdómin í endamálsorðingini.

### Atkomumøguleikin

Tað er av stórum týdningi at tøknin er lætt atkomulig, soleiðis at eingin forðan er fyri, at næmingarnir fáa brúkt teldurnar í mestan mun, tá hugurin er til tað. Havt eigur kanska at vera í huga, at genturnar vilja hava tað meira friðarligt enn dreingirnir. Hetta havi eg tó ikki havt nakrar trupuleikar av í Svínoy.

Eisini er sera týðandi at ferðin á netinum er skjót og trygg soleiðis at tøknin ikki verður ein forðan í sær sjálvum.

Eru fíggjarligar forðingar, føra hesar til at brúkið verður avmarkað. Tá kann tað óhepna eisini henda, at nýtslan verður meinast rakt á økjum, har sum barnið akkurát hevur mestan áhuga. T.d. tí eitt nú tónleikur er so dýrur at taka niður av alnótini.

Eg vil eisini leggja afturat her, at tað eisini er týðandi, at eingin forðing er fyri at næmingarnir sleppa til egið tilfar heimanífrá.  Í okkara føri sleppa næmingarnir til egið tilfar gjøgnum intranetið. Men eisini hevur FirtClass skipanin verið hent.

### Forritini

Best  egnaðu forritini eru tey, sum næmingarnir kunnu skapað nakað sjálvir við. Eg kann siga av egnum royndum, at hava forritini ov fáar avbjóðingar troyttast næmingarnir skjótt, meðan tey forritini sum hava nógvar avbjóðingar og/ella tey, sum geva børnunum møguleika at skapa nakað sjálvi, brúka tey aftur og aftur. Stuttligt er at síggja, hvussu huðagóð tey eru, og hvussu glað tey eru fyri tað, sum tey hava gjørt.

Sum nevnt í teoripartinum eru hesi forritini eisini mennandi fyri teirra krittiska sans. Hetta at menna teirra krittiska sans við at lata næmingarnar royna seg fram við einum forriti, er eisini nakað, sum vit í Svínoyar skúla hava góðar royndir við í

sambandi við gerð av heimasíðum. Ì staðin fyri at vera úti við peikifingrinum allatíðina hevur dentur heldur verið lagdur á, at tey sjálvi fáa hug at betra um heimasíðuna, tá tey gjøgnum teirra menta førleika, hava fingið tað fatan, at nú kann teirra heimasíða gerast enn betur.

## Innlæringin

Tá næmingarnir hava havt sera góðan hug at brúka teldurnar, hava teir eisini verið sera høgt motiveraðir fyri at loysa tær uppgávur og trupulleikar, sum teir hava møtt á vegnum. Tað vil siga, at næmingarnir hava lært við at loysa aktuellar uppgávur so hvørt. Vit kunnu siga, at tey hava lært við hjálp av at spæla, tí sum nevnt í teoripartinum, uppfata tey arbeiðið við telduna sum eitt spæl tá tey eru so høgt motiverað.

Tá teir hava fingið hjálp frá øðrum, hava teir fingið hjálpina bæði frá hinum næmingunum og frá læraranum. Læraran siga tey, at tey hava uppfatað meira sum ein, sum vegleiddi og hjálpti enn ein, sum endiliga skuldi læra tey nakað við telduni..Tað vil siga, at hendan innlæringin ikki hevur verið bundin at aldri og kyni.

*“Det er legen, der er målet, og læringen der er midlet.”*

Hugurin eftir at læra er so stórur, at tey fegin arbeiða víðari eftir skúlatíð.

Eitt, sum eg sjálvur meti, kann hava havt ávirkan á, at næmingarnir tíma so ógvuliga væl at fáast við kt í Svínoy, kann vera, at har eru ikki so nógv onnur frítíðarítriv, sum kappast við kt um tíðina hjá børnunum. Tí sum sagt arbeiða tey eisini heima við telduni, bæðið á lokala netinum og allnótini.

## Persónliga menningin

Næmingarnir halda sjálvir, at teir eru betri førir fyri at arbeiða við kt og hava lættari við at brúka kt enn teirra javnaldrar, sum ikki hava havt sama møguleika at nýta telduna so nógv. Vit kunnu siga, at teirra gerandis dagur er tað øðrvísi, at tey hava nakað lættari við at seta seg við eina teldu og brúka tey samskiftisamboð, sum hon gevur.

Hendan førleika hava tey fingið við at arbeiða við teldum, á lokala netinum og á internetinum, einsamøll ella saman við øðrum. Við at nýta skapandi kreativ forrit, sum ofta leggja upp til, at fleiri vegir kunnu náa sama máli. Sum menna sjálvstøðuga hugsunarháttin hjá barninum, styrkja sjálvsálitið og gera barnið betri ført fyri at arbeiða saman við øðrum, tí tað er vorðið betur til at lofta hugskotum frá øðrum.

**Niðurstøða**

Netið "Tykissamfelag Svínoy" hevur ment førleikan hjá Svínoyar skúla at nýta kt í undirvísingini sum ein heilt náttúrligan part av gerandisdegnum á skúlanum. Hetta er gjørt, saman við aðrari kt tøkni á skúlanum, á ein hátt, sum gevur næmingunum hug og árræði til allatíðina at gerðast enn betri á kt økinum.

Gerandisdagurin hjá teimum er merktur av, at teir hava fingið ein hugburð til kt, sum ger, at teir hava sera lætt við at brúka kt í tí dagliga. Kt hevur harafturat ment teirra sjálvsálit, teirra evni til at arbeiða sjálvstøðugt og teirra evni til samarbeiði.

At enda verður mælt til, at allir skúlar, sum ætla at menna kt førleikan hjá næmingunum, hava í huga:

**At uttan kt atkomumøguleikar eingin kt menning.**

Eru atkomumøguleikarnir til kt góðir, fáa teir eisini aðrar ágóðar, eitt nú at næmingarnir fáa sjálvsálit, og tí kunnu arbeiða bæði sjálvstøðugt og saman við øðrum.

## Keldulisti

Jepsen, Sadedin Elmazovski og Knudsen, Ulrik: 2003 Den kreative computer Semiforlaget 144 s.

Vinnumálaráðið.

Fyrrverandi og núverandi næmingar við Svínoyar Skúla.

## **Fylgiskjal** (samansjóðað svar frá næmingum)

**Spurningar til næmingar.**

Hevur tann lætta atgongdin til teldunetið í Svínoy ment tín førleika ella tíni evni til at nýta kt? **Ja.**

Kanst tú í dag siga at tú hevur ein betri førleika innan kt, enn tú annars vildi havt, tí tú hevur nýtt teldunetið? **Ja, avgjørt.**

Kanst tú greiða eitt sindur frá hesum? **Nógv, ið ongatíð hava havt góðan møguleika at nýta teldur og netið, duga nærum ikki at nýta teldur. Hetta hevur ikki verið nakar trupulleiki hjá mær.**

Heldur tú í dag, at tað er lættari hjá tær at seta teg við eina teldu, tí tú nýtti telduna so nógv í Svínoy? **Ja, tá tú hevur roynt tað nógv, veitst tú hvat tað er...**

Hvønn tydning heldur tú tað hevur havt, at teldustovan var mestsum ein partur av skúlastovuni? **Tað gjørdi tað lættari at koma til teldurnar, og tí vóru tær meiri nýttar.**

Hevur tað havt nakran tydning, at internetsambandið er gott og skjótt? **Ja, tá internetsambandið er seint, hevur tú ikki sama møguleika og hug at nýta tað.**

Heldur tú, at tað hevur havt týdning, at tú slapp dagliga til teldurnar? **Ja, tað hevur givið betri royndir og førleika.**

Brúkti tú teldunetið heima? **Ja, nógv**
Um nei hví ikki?

Hevur tú lært við at royna teg fram ? (spæla spøl íroknað)  **Ja.**

Hevur tú lært av øðrum næmingum? **Ja, ein lærir eisini av royndunum hjá hinum**

Hevur tú lært av yngri næmingum?  **Aldurin hevur einki at siga, bara tað er okkurt ein**

Hevur tú lært av eldri næmingum?  **hevur brúk fyri**.

Hevur tú lært av læraranum? **Ja.**

Hevur tú uppfatað læraran sum ein, ið skuldi læra teg nakað ella ein, sum hjálpti tykkum, tá ið tit stóðu føst? **Sum ein, ið hjálpti okkum, tá vit stóu føst.**

Hevði tað týdning at tú ikki nýttist at hugsa um prísin á internetinum? **Ja, tá var ikki neyðugt at hugsa um, hvat tú gjørdi á netinum, einki kostaði...**

Broyttist hetta, tá prísur bleiv settur á? **Ja, tá gjørdist tað ov dýrt at taka niður av netinum, eitt nú tónleik og spøl.**